# – Lat okkum gloyma gamalt agg og ósemjur



*- Tað er eitt ábyrgdarfult arbeiði at vera býráðslimur. Vit eru vald at umsita borgarans pening, og er tað í stóran mun vit, ið koma at gera av hvussu trivnaðurin verður í kommununi í komandi tíðum, segði Jan Christiansen í avskeðsrøðu síni*

**Fyrrverandi borgarstjórin, Jan Christiansen heitti á allar limirnar í býráðnum um at finna semjur, tá mál skulu loysast. – Vit gera av, hvussu trivnaðurin verður í framtíðini, segði hann**

STJÓRAFARVÆL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

"Bardagi eftir at koma í samgongu og at gerast borgarstjóri".

Hesi orðini nýtti fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, tá hann hevði orðið á býráðsfundinum í farnu viku, tá nýggja samgongan formliga tók við.

Sjálvur hevði hann sitið sum borgarstjóri tey seinastu árini, men var ikki alt ov fegin um at lata sessin frá sær til eftirmann sín, Heðin. Serliga ikki tá hann hugsaði um mátan hetta hendi uppá.

- Fyrsta fólkavalda býráðið tók við í januar 1909, og eg veit ikki, hvussu bardagin eftir at koma í samgongu, og serliga at koma at sita í borgarstjórasessinum, hevur verið síðani tá.

- Men neyvan hevur slíkur grantlileikur, sum tann vit hava verið vitni til aftaná valið 9. november, funnið stað áður, segði Jan í avskeðsrøðu síni.

Hóast alt hetta, so mælti hann kortini býráðslimum til at lata gamalt agg og ósemjur fara aftur við borðinum, og heldur líta fram-eftir.

### Samstarv neyðugt

Í takkar- og avskeðsrøðu undraðist Jan Christiansen á framferðina við skipanina av nýggju samgonguni.

- Tvær samgonguavtalur um skipan av meiriluta vórðu gjørdar og undirskrivaðar, áðrenn tann triðja avtalan kom í lag, um hvør skuldi sita við maktini, og hvør skuldi sita í borgarstjórasessinum tey komandi fýra árini.

- Tað sum er farið fram, ger tíverri ikki at borgarin fær størri virðing fyri okkum býráðslimum, og sigast má, at tignin hjá býráðnum hevur fingið eitt skot fyri bógvin, segði hann.

Hann legði tó dent á, at tað kortini er umráðandi at allir 13 býráðslimir ikki lata avtalubrot, sum vórðu gjørd eftir valið, ávirka arbeiðið teirra. Heldur átti býráðið at leggja dentin á at samstarva og gera sítt til, at kommunan gerst eitt enn betri stað hjá fólki at virka og búgva í.

- Tað er eitt ábyrgdarfult arbeiði at vera býráðslimur. Vit eru vald at umsita borgarans pening, og er tað í stóran mun vit, ið koma at gera av hvussu trivnaðurin verður í kommununi í komandi tíðum.

- Tí er umráðandi at vit, í mest møguligan mun, eru samd, tá stungið verður út í kortið um framtíðar avgerðir í kommununi, segði Jan.

At enda takkaði hann trimum býráðslimunum, ið annaðhvørt ikki vórðu afturvaldir ella vóru uppstillaðir – Schumann Hjaltalin, Jákup Suna Joensen og Tórfinn Smith.

Samstundis veitti hann tøkk til bygdaráðslimirnar í kommununum í Kirkjubø, Hesti og í Nólsoy fyri gott samstarv og teirra arbeiði sum bygdaráðslimir.

---



## Langt síðani seinast

*Tað eru liðin nærum fimti ár síðani Javnaðarflokkurin seinast átti borgarstjóran í Havn. Hetta var í tíðarskeiðnum 1994 til 1948 og aftur frá 1952 til 1957 tá J. P. Henriksen var borgarstjóri. Heðin Mortensen er her avmyndaður frammanfyri undangongumanni sínum, J. P. Henriksen*

# Skal samansjóða hugburðin hjá øllum

**- Nú skal tað veruliga standa sína roynd at samansjóða hugburðin hjá kvinnum og monnum í ein góðan politikk fyri kommununa sum heild, segði borgarstjórin, Heðin Mortensen í setanarrøðu síni**



*- Ætlanin at reka ein varligan og ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, har trivnaðurin hjá tí einstaka verður settur í hásæti, sigur nýggi borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensena*

Sum leiðari í nýggju býráðssamgonguni í Havn er Heðin Mortensen komin í ta sjáldsomu støðuna, at kvinnurnar í veruleikan hava meirilutan.

- Og hetta fer tí eisini at seta síni spor á býráðsarbeiðið, segði hann.

Í setanaðarrøðu síni nevndi hann, at kynsbýtið í nýggja býráðnum er meiri umboðandi fyri samfelagið enn tað hevur verið áður. Veljarin ynskti eisini hetta, og setti tí seks kvinnur og sjey mans í býráðið við seinasta val.

### Ein veruligur høvuðsstaður

Í takkarrøðuni vísti Heðin Mortensen á, at honum var víst eitt stórt álit við at gerast borgarstjóri, og at hann ætlaði at leggja stóran dent á loysa hesa uppgávuna væl.

Hann kann taka við starvinum í eini kommunu, sum hevur verið fyri stórari menning tey seinastu mongu árini. Kommunan hevur eftir førimuni fylgt við tíðini, so hon í dag er eitt framkomið samfelag, sum uttan at blúgvast kann bera heitið sum høvuðsstaður.

- Tað verður tí uppgávan hjá okkum, sum nú manna býráðið at halda fast við hesa menning og skipa soleiðis fyri at kommunan er førr fyri at taka ímóti framtíðini og teimum avbjóðingum, sum hon hevur í sær, segði Heðin Mortensen.

Ætlanin er at reka ein varligan og ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, har trivnaðurin hjá tí einstaka verður settur í hásæti. Út frá hesum skal vinnulívið og virksemið í kommununi mennast.

Kommunan er nú eisini vorðin størri, við luttøkuni av Kirkjubøar, Hests og Nólsoyar kommunu.

- Hetta eru eisini avbjóðingar fyri Tórshavnar býráð. Nú mugu vit meir enn fyrr hava í huga, at ein verð er uttanfyri Verona. Hana hava vit somu skyldu til at lívga um og menna, sum ta gomlu kommununa.

- Tórshavnar kommuna er í dag eitt fjølbroytt samfelag, sum fegin vil framá, og sum stór krøv verða sett til. Okkara setningur her í býráðssalinum verður saman við umsitingini at liva upp til krøvini og álitið - í góðum samljóði við borgararnar, segðI Heðin Mortensen at enda í røðu síni.

### Tann 18. í røðini

Hetta er níggjunda ferðina, at Heðin tekur sætið í Tórshavnar býráð. Nú, hann er vorðin borgarstjóri, er hann tann 18. í røðini.

Síðani hann á fyrsta sinni kom inn í býráðið hin 1. januar í 1973 hava fleiri borgarstjórar verið - fyrst Petur Christiansen í átta ár og eftir hann Poul Michelsen í samfull 12 ár.

Seinastu tólv árini hevur stjórastarvið tó skift oftari, tí bæði Lisbeth Petersen, Leivur Hansen og Jan Christiansen hava einans sitið í fýra ár.